Jóannes Jacobsen, Búskaparráðið:

# Frágreiðingin byggir á ósannindi

**–Tey, ið hava skrivað partin um búskaparfrøði í Menas-frágreiðingini, hava ikki skil fyri búskaparfrøði. Tað er í fleiri førum beinleiðis ósannindi, ið verða ført fram, og frágreiðingin heldur fast við gamlar mýtur, sigur Jóannes Jacobsen, búskaparfrøðingur**

MENAS-FRÁGREIÐINGIN
*Heri á Rógvi*



*Jóannes Jacobsen, búskaparfrøðingur, heldur tað vera óheppin við einari frágreiðing, ið byggir á beinleiðis ósannindi og skeivleikar, tá hugsað verður um, at hon skal elva til kjak.*
*Mynd: Álvur Haraldsen.*

Tann nógv umrødda Menas-frágreiðingin viðger eisini føroyska búskapin. Tað er einamest árinini av, at ein oljuvinna verður veruleiki í Føroyum, sum verða umrødd. Vit hava spurt Jóannes Jacobsen, búskaparfrøðing, um at gera viðmerkingar til henda partin av frágreiðingini. Jóannes starvast til dagligt sum skrivari hjá Búskaparráðnum og hevur gott innlit í búskaparligu viðurskiftini, ið viðvíkja Føroyum. Tað skal eisini viðmerkjast, at Menas-frágreiðingin á føroyskum er ein samanskrivað frágreiðing, ið er gjørd so stutt sum gjørligt.

## Nakrar skøvur

Føroyski búskapurin fyllur tíggju síður í Menas-frágreiðingini, og tað kann altíð verða kjakast um, hvørt hetta er nóg mikið ella ei. Eisini verða búskaparlig atlit tikin við í parti viðvíkjandi Hetlandi og stýringini av oljubúskapinum. Jóannes Jacobsen er av teirri sannføring, at á summum økjum kundi frágreiðingin um búskapin verið gjørd styttri, tí frágreiðingin nevnir fleiri evni, ið tykjast bert verða nevnd fyri at verða nevnd.

–Tá tú lesur frágreiðingina, værnast tú, at frágreiðingin hevur nakrar skøvur. Fleiri ting eru væl frágreidd, men so kemur tú á ting, ið eru púrasta skeiv. Tað er heilt klárt, at tann ella tey, ið hava skrivað henda partin í frágreiðingini, ikki hava skil fyri búskaparfrøði, sigur Jóannes Jacobsen.

Sum dømi um eina skøvu nevnir hann partin 5.6.3 um burturtrokan og bústaðarviðurskiftini, har tað verður tosað um, at myndugleikarnir eiga at hava eftirlit við eftirspurninginum eftir bústaði í Havn og samstundis hyggja eftir, at prísurin varð hildin niðri. Hesin parturin passar ikki inn í heildina, heldur Jóannes.

Í frágreiðingini verður greitt frá fleiri fyribrigdum í føroyska búskapinum. Nortið verður við umstøðurnar í Føroyum eins og tað verður nortið við meira teknisk búskaparlig viðurskifti. Tað er einamest á hesum økinum, at Jóannes hevur flestu viðmerkingarnar.

## Ósannindi

–Tað er fyri so vítt skeivt soleiðis, sum tingini eru samansett, tí har vanta nógvir samanhangir. Ein kann ímynda sær, at teir hava verið fleiri, ið hava skrivað, síðani er tað skrivað saman, og her er okkurt komið skeivt fyri. Tað er eisini møguligt, at tað hava verið málsligar forðingar av onkrum slag, men tað er heilt klárt, at hesir hugsa ikki búskaparfrøðiliga, sigur Jóannes Jacobsen.

Fyrsta dømi, ið Jóannes vísir á er kapitli 5.5 um makrobúskaparligu árinini av oljuframleiðslu. Har stendur:

“Yvirskotið á gjaldsjavnanum økist við vanda fyri ovhitan, sum hevur við sær inflatión og harav fylgjandi versnandi javnvág millum føroyska búskapin og búskapin hjá samhandilslondunum. Ein tílík gongd kann hava við sær, at verandi vinnuvegir verða trokaðir til viks, og samfelagið tess meira bundið av oljuinntøkum.”

–Hetta er í veruleikanum akkurát øvut. Her vísa teir, ið hava skrivað sera lágt støði. Inflatión er neyðug. Vit finna fyrst olju, síðani skal inflatión til fyri at fáa alt upp á pláss, og hetta eru allir búskaparfrøðingar samdir um, men kortini stendur júst tað øvuta í Menas-frágreiðingini, og hetta er vánaligt, sigur Jóannes Jacobsen.

Eisini parturin viðvíkjandi Hálendsku sjúkuni hevur skeivleikar í sær, sambært Jóannesi.

Har stendur m.a.: “Fyribrigdið Hálendska sjúkan ger seg galdandi, um ein stór kolvetnisútflutningsvinna hevur við sær, at kursurin verður yvirmettur og á henda hátt veksur um prísin á útflutningi og minkar prísin á innflutningi. So við og við fer hetta at hava við sær, at handilsjavnin versnar, tá útflutningurin av øðrum.” vørum enn kolvetnum minkar, og nøgdin á innflutningi veksur. Íløgur í aðrar vinnur enn kolvetnisvinnuna minka í stórum, og búskapurin verður meira og meira heftur at inntøkunum frá einum minkandi náttúrutilfeingi.

–Hesin parturin er púra skeivur. Oljuvinnan er einki at vera bangin fyri, og hetta við hálendsku sjúkuni passar heilt einfalt ikki. Fyribrigdið hálendsk sjúka hava teir fullkomiliga misskilt, sigur Jóannes Jacobsen.

Aðrastaðni í búskaparpartinum av Menas-frágreiðingini verður eisini tosað um, at gjaldoyrasamstarvið, ið Føroyar hava við Danmark, fer at verja Føroyar móti hálendsku sjúkuni, og hetta Jóannes eisini vera langt av leið og beinleiðis ósatt.

Tann parturin, sum Jóannes er mest keddur um er parturin útliti fyri fjølltáttan (5.10). Har stendur m.a.: “Føroyar hava ein ófjøltáttaðan búskap, sum so at siga bara fær sítt ríkidømi við at gagnnýta náttúrutilfeingið í havinum.”

–Hetta er nakað øgiligt tvætl. Tað, vit liva av í Føroyum, er, hvat framleiðslumiðlarnir skapa. Tað er arbeiðsmegi, náttúrutilfeingi og kapitalur. Vit liva ikki av fiskivinnuni, men hon betalur fyri innflutning. Vit liva av øllum tí, ið framleiðslumiðlarnir skapa, tí ber ikki til at siga, at búskapurin í Føroyum ikki er fjølltáttaður. Hatta er ein øgiliga gamal hugsunarháttur, sum ikki kann nýtast longur, har vit bara tosa um virðisskapn, um hetta fer til útflutning, sigur Jóannes Jacobsen.

## Skeivt støði

Jóannes Jacobsen heldur, at henda frágreiðingin loyvir nøkrum gomlum mytum um føroyska búskapin framhaldandi at halda sær á lívi.

–Hetta, sum teir hava skrivað, stuðlar beinleiðis uppundir tær mýtur, ið eru um føroyska búskapin, sigur Jóannes Jacobsen.

–Tað er hugstoytandi, at hetta skal vera grundarlagið fyri einum sakligum kjaki, tá hetta í nógvum førum byggir á beinleiðis ósannindi og skeivleikar, sigur Jóannes Jacobsen.




*Teir tríggir, f.v. Jay Wagner, John Christensen og Stephen Royle, eru partar av liðnum, sum hava verið við til at gjørt Menas-frágreiðingina.*
*Mynd: Heri á Rógvi.*



# Blokadan herd

**Blokadan hjá Føroya Lærarafelag mótvegis allari uppgávugerð til skrivligu próvtøkurnar í fólkaskúlanum í summar, er nú víðkað til savnsrøktina. Tí verða smíðhøli, lívfrøðihøli og onnur høli á skúlunum kring landið skjótt ónýtilig**

BLOKADA
*Turið Kjølbro*



*– Spurningurin er, hvat hendir, tá ið høli á skúlunum gerast ónýtilig. Har vóna vit, at skúlaleiðararnir stuðla okkum í stríðnum, sigur Elsa Birgitta P. Petersen, forkvinna í Føroya Lærarafelag*

Blokadan, sum Føroya Lærarafelag setti í verk seinasta heyst ímóti gerð av skrivligum próvtøkuuppgávum til royndirnar í summar, er nú herd og víðkað. Tað hevur við sær, at lærarar ikki sleppa at røkja søvn, smíðhøli, lívfrøðihøli og aðrar tilíkar skúlastovur. Og hendir einki, sum bendir á, at málið verður loyst, fer Føroya Lærarafelag at seta onnur tiltøk í verk.

Útlitini til, at málið verður loyst í bræði eru alt annað enn góð. Fundur hevur verið millum Føroya Lærarafelag, kommunuumboð og fólkaskúladeildina í Mentamálastýrinum, men har kom einki burturúr. Tær stóru kommunurnar siga framvegis, at tær kunnu hava ábyrgdina av savnsrøktini inni á skúlunum, um tær fáa pening frá landinum fyri tað, meðan tær smærru kommunurnar als ikki vilja vita av savnsrøktini. Ikki sørt undrunarvert, tá ið hugsað verður um, at umboð fyri kommunurnar hava verið við til at gjørt álitið, sum leggur upp til, at kommunurnar eiga ábyrgdina av savnsrøktini.

– Hetta er sum ein skotgravsbardagi. Allir partar halda við sítt og útlitini eru vánalig um at nakað hendir. Mentamálastýrið er okkara arbeiðsgevari, tað er har vit venda okkum og tað eru tey saman við Fíggjarmálastýrinum, sum skulu at loysa málið, sigur Elsa Birgitta P. Petersen, forkvinna í Føroya Lærarafelag.

Av sínum eintingum hevur Fuglafjarðar kommuna í fleiri ár rindað fyri røktina av smíðhølunum og lívfrøðihølunum. Umframt hava aðrir skúlar av tímajáttanini hjá skúlunum veitt lærarum tímaniðurskurð fyri at røkja søvnini. Hetta eru undantøkini. Tað vanliga hevur verið, at lærarar hava røkt søvnini uttan samsýning.

## Vænta stuðul

Víðkaða blokadan varð sett í verk 20. februar og gera lærarar eftir boðum frá Føroya Lærarafelag, verða nógv høli skjótt ónýtilig.

– Spurningurin er, hvat hendir, tá ið høli á skúlunum gerast ónýtilig. Har vóna vit, at skúlaleiðararnir stuðla okkum í stríðnum. Teir eru forlongdi armurin hjá Mentamálastýrinum í og við, at teir hava nógv samskifti við Mentamálastýrið og lata boð frá Mentamálastýrinum víðari til lærararnar. Hóast tað meti eg, at skúlaleiðarar eiga at stuðla hesum stríðnum og ikki lata lærarar brúka ónýtilig skúlahøli.

– Ein grein í fyrisitingarlógini sigur, at tað er uppgávan hjá Mentamálastýrinum at síggja til, at undirvísingin kann fara fram. Síggja kommunurnar ikki til, at hølini eru í lagi, kann Mentamálastýrið seta eitthvørt í verk og krevja pengingin aftur frá kommununum. Tískil kann Mentamálastýrið gera nakað, um tey vilja, sigur Elsa Birgitta P. Petersen.

## Vakið eyga

Tað var tíðliga seinasta heyst, at Føroya Lærarafelag lýsti blokadu mótvegis allari uppgávugerð til próvtøkurnar til fráfaringarroynd fólkaskúlans og víðkaðu fráfaringarroynd fólkaskúlans. Felagið sýtir øllum limum, virkandi lærarum, fráfarnum lærarum og lærarum, sum eru í øðrum starvi, at taka á seg at gera próvtøkuuppgávur fyri Mentamálastýrið. Orsøkin er, at Føroya Lærarafelag vil hava viðurskiftini viðvíkjandi savnsrøktini og KT-vørðunum í rætt lag, sum semjan millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið undirskrivað av tveimum landsstýrismonnum eftir drúgva verkfallið á vári 2000 áleggur.

Mentamálastýrið kann valla heita á onnur enn føroyskar lærarar um at gera próvtøkuuppgávur. Landsstýrismaðurin við mentamálum hevur áður sagt í blaðnum, at tað kemur ikki upp á tal at fara uttanlands eftir próvtøkuuppgávum til føroysku næmingarnar í 9. og 10. flokki. Átekur nakar lærari sær uppgávuna, kann viðkomandi vænta, at tað fær avleiðingar. Felagið heldur eitt vakið eyga við limunum, men fyri at binda um heilan fingur, umhugsar tað at herða blokaduna soleiðis, at noktað verður teimum, sum verða biðin um at verða próvdómarar, at gera hetta arbeiðið. Fyribils umfatar blokadan allari próvtøkugerð og savnsrøkt.



# Altjóða Kvinnubønardagur í Klaksvík

**Fríggjadagin klokkan 17.00 verður Altjóða Kvinnubønardagur hildin í K.F.U.M. og K. í Klaksvík**

KVINNUBØNARDAGUR
*Ragnhild Ellingsgaard*

**Klaksvík:** Hetta er eitt tvørkirkjuligt tiltak, hvørs endamál er at savna kvinnur til bøn, eins væl og peningur eisini verður savnaður inn til vælgerandi endamál.

## Tvørkirkjuligt tiltak

Hetta er 20. árið á rað, at skipað verður fyri hesum tiltaki í Klaksvík, og verður dagurin í ár hildin í hølunum hjá K.F.U.M og K.

Frá fyrireikarunum frætta vit, at dagurin byrjar klokkan 17.00, og eru allar kvinnur hjartaliga vælkomnar.

– Hetta er eitt tvørkirkjuligt tiltak, so ein nýtist ikki at hoyra til nakran ávísan trúarbólk, siga fyrireikararnir.

Í ár eru tað 4 kvinnur frá ymsum samkomum, ið skulu fyrireika dagin.

– Evnið fríggjadagin er »Verið Sátt«, og er tað tikið úr einum versi í Bíbliuni. Meiningin við hesum er, at vit skulu verða sátt við øll; eisini tey, sum ikki hoyra til sama trúarbólk sum ein sjálvur, greiðir ein av fyrireikarunum frá.

## Savna pening inn

Endamálið við degnum er at savna kvinnur saman til bøn.

– Vit biðja fyri øllum teimum, sum ikki hava tað so gott, siga fyrireikararnir.
Eisini verður sangur á skránni, eins væl og eitt kaffiborð eisini verður sett upp.

Harafturat verður eisini peningur savnaður inn til vælgerandi endamál, hesuferð til Rumenien.

– Og so kemur Absalon Matras eisini at siga nøkur orð. Hann hevur fleiri ferðir verið í Rumenien við klæðum til tey fátøku, og kemur at hann greiða frá hesum túrunum, siga fyrireikararnir.

## Øll vælkomin

Dagurin byrjar sum sagt klokkan 17.00, og skulu vit heilsa og siga, at allar kvinnur er hjartaliga vælkomnar.